UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **28. juni 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-60**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 104/2019 frá Beinir Johannesen, løgtingsmanni, eftir Tingskipanini § 52a Fyrispurningur um lestrarpláss, settur landsstýrismanninum í uttanríkis - og mentamálum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv tøk lestrarpláss eru til miðnáms-, yrkis- og hægri útbúgvingar fyri komandi skúlaár?

2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at økja um lestrarplássini innan hesar útbúgvingar?

Svar

Svar til spurning 1: Sambært upplýsingum frá Undirvísingarstýrinum eru tøk lestrarpláss á ymiskum breytum á miðnámsskúlunum kring landið.

Talva 1: Tøk pláss á miðnámsskúlum og heilsuskúlanum.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

	Tøk pláss
Miðnám í Vestmanna	
Tilfeingisbreyt	3
Heilsuskúli Føroya	
Heilsuhjálpari	7
Námsfrøðiligur hjálpari	12
Klaksvíkar HF-skeið	
Fyrireikingarbreyt	8
Tekniski Skúlin í Klaksvík	
Tøknibreyt	0
Miðnámsskúlin í Suðuroy	
Hugbreyt	13
Náttúrubreyt	13
Miðnám á Kambsdali	
Búskaparbreyt I	0
Hugbreyt	10
Yrkisnám FHS	5
Náttúrubreyt	0
Búskaparbreyt II	15
Fyrireikingarbreyt	12
Glasir	
Fyrireikingarbreyt	6
Náttúrubreyt	7
Hugbreyt	7
Yrkisnám FHS	5
Búskaparbreyt I	12
Búskaparbreyt II	16
	151

Á yrkisnámi eru umleið 250 næmingar tiknir upp. Bæði á Glasir og á Tekniska skúla í Klaksvík er talan um fyltar flokkar á øllum økjum. Møguliga kann rúm finnast fyri einstøkum næmingum á ávísum økjum, men talan er eisini um bíðilista á øðrum økjum.

Á maritimu útbúgvingunum eru hesi pláss:

Sjónám:

10 pláss eru enn tøk til skipara
6 pláss eru enn tøk til skipsatstøðara

Vinnuháskúlin:

14 pláss eru enn tøk til skipara
10 pláss eru enn tøk til maskinmeistara
9 pláss eru enn tøk til maskinist
8 pláss eru enn tøk til skipsførara aspirant
5 pláss eru enn tøk til maskinmeistara aspirant

Tá talan er um hægri útbúgvingar, er tað soleiðis, at umsóknarfreistin enn ikki er farin. Útbúgvingarstovnarnir hava upplýst, at hesi lestrarpláss eru tøk:

Glasir:

Fíggjarbúskapur 30 lestrarpláss
Tænastubúskapur 30 lestrarpláss
Byggifrøði 30 lestrarpláss (*byrjar í januar*)

Harumframt bjóðar Glasir ymiskar hálvtíðarútbúgvingar, har tøk pláss eru. Hesar verða bodnar út móti gjaldi.

Fróðskaparsetrið tekur í ár inn til hesar útbúgvingar:

Bachelor í búskaparfrøði – 25 lestrarpláss
Bachelor í undirvísing (Fólkaskúlalærari) – 35 lestrarpláss
Bachelor í føroyskum – 25 lestrarpláss
Bachelor í KT-verkfrøði – 40 lestrarpláss
Bachelor í lívfrøði –12 lestrarpláss
Bachelor í mýlalívsvísindum – 12 lestrarpláss
Bachelor í námsfrøði – 35 lestrarpláss
Bachelor í politikki og umsiting – 20 lestrarpláss
Bachelor í sjúkrarøktarfrøði – 30 lestrarpláss
Bachelor í samfelagsvísindum – 20 lestrarpláss
Bachelor í søgu – 20 lestrapláss
Master í føroyskum – 10 lestrarpláss
Master í politikki og umsiting – 20 lestrarpláss
Master í samfelagsvísindum – 20 lestrarpláss
Master í søgu – 20 lestrarpláss
Master í heilsuvísindum – 24 lestrarpláss
Hjánám í føroyskum – 10 lestrarpláss
Hjánám í søgu – 10 lestrarpláss
Hjánám í samfelagsvísindum – 10 lestrarpláss

Tilsamans 374 lestrarpláss í 2020.

Harumframt bjóðar Setrið eisini út ískoytisútbúgvingar fyri lærarar og námsfrøðingar, og allar deildir bjóða eisini út stakskeið, har tøk pláss eru. Hesi verða bjóðað út móti gjaldi.

Svar til spurning 2: Tað er rætt, sum spyrjarin vísir á, at "koronukreppan hevur havt nógvar avleiðingar", og at landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum hevur vist á, at tann 12. mai 2020 var ein triðingur av teimum í COVID-19 stuðulsskipanini hjá ALS undir 30 ár. Síðani er tó tað gleðiliga hent, at tal teirra, ið eru í hesari skipan, er nógv minkað, frá 2735 h. 12. mai til 1516 h. 26. juni. Hesi tøl lækka enn dag frá degi, og kunnu vit ganga út frá, at tey ungu eiga góðan lut í hesari minking.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Útbúgvingarstovnar hava upplýst, at teir hava fingið fyrispurningar frá ungum, sum hava broytt sínar ætlanir, og ynskja at fara undir útbúgving nú, og av yvirlitinum til svar uppá spurning 1. sæst, at í fleiri førum eru tøk pláss.

Sum staðfest í samgonguskjalinum er mál samgongunar at menna og styrkja útbúgvingarmøguleikarnar, og er hetta arbeiðið komið væl í gongd. Sum dømi kann nevnast, at á Fróðskaparsetrinum verður arbeitt við eini ætlan um at taka inn til sjúkrarøktarfrøði 2 ferðir um árið, har 20 lesandi byrja á sumri og 20 á vetri, t.v.s. árliga 10 fleiri enn nú. Eisini verður arbeitt við at taka inn til bachelor í námsfrøði tvær ferðir um árið, so samlaða talið væntandi hækkar til 48 lesandi á hvørjum ári.

Arbeiði okkara at økja talið av lestrarplássum fer at halda fram, og vón okkara er, at Løgtingið fer at játta neyðugu fíggingina, sum hetta krevur.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrimaður

Tinghúsvegur 5-7 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ummr@ummr.fo • www.ummr.fo